

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 05 - 2013

# ES kannar prísir hjá oljufeløgum

Týsdagin komu fólk hjá eftirlitsstovninum hjá EFTA, ESA óvæntað inn á gólvið á skrivstovunum hjá trimum stórum oljufeløgum, BP, Shell og Statoil fyri at fáa fatur á innanhýsis skjølum í sambandi við prísásetingar av olju og gassi og øðrum vørum. Tað er ES nevndin, sum hevur givið boð um at kanna, um alt er farið rætt fram hjá hesum feløgum, tá tað um prísáseting ræður skrivar BBC News á síni heimasíðu. Kanningarnar snúgva seg um, antin feløgini hava brotið kappingarreglarnar í prísásetingini ella ikki. Sambært BBC sigur ES nevndin, at hon ikki hevur nakað prógv um, at feløgini hava forbrotið seg, men hon ynskir kortini at kanna viðurskiftini. Málið snýr seg um illgruna um brot á sokallaða kartellforboðið í EØS avtaluni, grein 53. Slíkt kann geva bót upp til 10% av umsetninginum undanfarna ár sigur EU- og kappingarrættarserfrøðingurin Øyvind Andersen í advokatfelagnum Wikborg Rein til aftenposten.no. Hann sigur, at ES kommissjónin hevur illgruna um, at Statoil hevur samskipað sínar prísir við teir hjá øðrum feløgum. Slíkt er ikki í tráð við galdandi avtalur. Sambært aftenbladet.no kann norska oljufelagið Statoil, um tað kann prógvast, at tað ikki hevur hildið kappingarreglarnar, fáa upp til 70 milliardir kr. í bót. Tilfarið, sum hald er lagt á, skal nú kannast í Brussel. Tað fer at ganga eitt ár, áðrenn nakað meira hendir. Um mett verður at orsøk er til at fara víðari við málinum, so kann tað enda við bót. Eftir tað fáa feløgini møguleika at svara, og kann tað taka upp til fimm ár at avgreiða málið endaliga.